Landsssjúkrahúsið



# Vegleiðing til avvarðandi at sjúklingum á intensivu deild G1

# Vælkomin á G1 intensivu deild

Hesin faldarin hevur til endamáls at upplýsa sjúklingar og avvarðandi um umstøður og mannagongdir á deildini, sum kunnu geva innlit í sjúklingagongdina, og á hvønn hátt avvarðandi kunnu vera um tann sjúka.
Faldarin er eitt ískoyti til ta kunning, ið starvsfólkini á deildini annars veita. Avvarðandi eru tí vælkomin at spyrja, um ivamál eru.

**G1 intensiva deild er ein partur av Bráðdeplinum á Landssjúkrahúsinum, og hevur 5 seingjarpláss. Deildin er tann einasta av sínum slag í landinum, og tekur tí ímóti øllum sjúklingum, ið hava tørv á intensivari viðgerð og røkt.**



## Tá sjúklingur verður innlagdur

Tað er ikki altíð, at sjúklingur hevur stundir at taka ymiskt til sjálvrøkt við sær heimanífrá, tá ið hann verður innlagdur á G1.
Eigur sjúklingur lutir til sjálvrøkt, ið hann hevur tørv á undir innlegging, heita vit á avvarðandi um at koma við hesum, tá stundir eru til tess. Tekur sjúklingurin heilivág, skal hesin fáast til vega skjótast gjørligt.

## Vitjanartíðir

Á intensivu deild eru ikki fastar vitjanartíðir. Tó er neyðugt at venda sær til leiðbeiningina í forhøllini, sum síðani varskógvar deildina um vitjandi. Harafturat er neyðugt at venda sær til eitt av starvsfólkunum, áðrenn farið verður inn til sjúklingin. Eftir kl. 23.00 og í vikuskiftinum er hurðin inn á deildina stongd.

Tað er umráðandi hjá sjúklinginum, at umhvørvið er friðarligt. Tí eiga í mesta lagi tvey avvarðandi at vitja sjúklingin í senn.
Av tí at fleiri sjúklingar kunnu liggja inni á somu stovu, kann vitjanartíðin verða ávirkað av hesum. Tað kann verða neyðugt at biðja avvarðandi bíða við at fara inn á stovuna, til nærri boð verða givin.



Verður barn innlagt intensivu deild, fær annað av foreldrunum altíð loyvi at vera innlagt saman við tí.

Ein uppihaldsstova er til avvarðandi at nýta. Inngongdin til hesa er fyrsta hurð til vinstru á gongini inn á deildina.
Av reinførisávum hava einans starvsfólk atgongd til køkarnar á deildini.
Møguleiki er fyri gisting á Gestalonini á Eirargarði til sjúklingar, sum ikki eru innlagdir og/ella til avvarandi.
Faldari við nærri kunning um gisting fæst á deildini, um tørvur er á tí.

Sølubúð og sjálvtøkur eru í forhøllini. Sølubúðin er opin gerandisdagar kl. 08.00-20.00, leygardag kl. 10.00-20.00 og sunnudag kl. 14.30-20.00.
Matarhøllin á Landssjúkrahúsinum er opin gerandisdag kl. 11.30-13.00. Har ber eisini til at keypa døgurða og eftirmat .

Vegna vanda fyri ovurviðkvæmi, og av trygdarávum, eru blómur og livandi ljós ikki loyvd á deildini.

## Fyrispurningar

Vaktarskifti og frágreiðingar um sjúklingarnar á deildini er kl. 07.00-07.30, kl. 15.00-15.30 og kl. 23.00-23.30. Uttan fyri hesar tíðir eru avvarðandi vælkomin at spyrja til sjúklingin. Ringjast kann til Landssjúkrahúsið og biðja um deildina G1, ella beinleiðis til á telefon 304599, lokal 5840. Best er, um *ein* avvarðandi kunnar seg um støðuna hjá sjúklinginum og síðani ber boðini víðari til onnur avvarðandi.

Øll starvsfólkini á G1 hava tagnaðarskyldu.

Starvsfólk á Landssjúkrahúsinum bera samleikakort. Hetta fyri at sjúklingar og avvarðandi kunnu skilja ímillum persónar og fakfólk, tey samskifta við. Samleikakortið upplýsir navn, starvsheiti og depilin, starvsfólkið starvast á.

**Sjúklingar á intensivu deild liggja við tøkniligari yvirváking sum ger, at starvsfólk áhaldandi kunnu gera sær eina neyvari meting av støðuni. Tólini hava ávaringarskipanir, sum kunnu tykjast ørkymlandi fyri bæði sjúkling og avvarðandi, um tey ikki vita, hvat hesar merkja.**
**Gevið gætur, at ávaringarskipanirnar fyrst og fremst eru ætlaðar sum trygd fyri sjúklingin.**

## Fartelefon

Neyðugt er altíð at sløkkja fartelefonir, áðrenn farið verður inn á intensivu deild G1. Ynskja avvarðandi at sleppa at tosa við tann innlagda, ber til at ringja beinleiðis til sjúklingatelefonina á deildini; tel.nr. er 304549.



## Miðlar

Sjónvarp við Televarpi er við hvørt seingjarpláss á deildini. Allar føroysku útvarpsrásirnar eru eisini at hoyra í sjónvarpinum.
Hevur sjúklingurin farteldu við, er tráðleyst alnet á Landssjúkrahúsinum.

Sjúklingar og avvarðandi hava møguleika at læna vikubløðini.

## Royking
Royking og nýtsla av rúsandi evnum eru ikki loyvd á fastognarøkinum hjá Landssjúkrahúsinum.

## Parkering
Uttan fyri G-bygningin/høvuðsdyrnar er tíðaravmarkað parkering í tveir tímar millum kl. 09.00 og 18.00. Víst verður til onnur parkeringsøkir nærhendis, um bilurin skal standa í longri tíð.

## Bussar
Leið 1, 2 og 4 steðga regluliga beint uttan fyri Landssjúkrahúsið.



## Prestur
Á Landssjúkrahúsinum er prestur, sum burturav tekur sær av at tosa við sjúklingar og avvarðandi. Hava sjúklingar ella avvarðandi tørv á at koma í samband við prest ella annan samkomuleiðara, antin til samrøðu ella andakt, hjálpa starvsfólkini á deildini fegin við hesum.
Bíblian, Sálmabókin og Songbók Guds Fólks eru tøkar á deildini.

## Sálarfrøðingur

Sum ein liður í tilbúgvingini hjá Landssjúkrahúsinum í sambandi við vanlukkur, kann ábyrgdarhavandi lækni fyriskipa sálarfrøðing frá psykiatriska deplinum at hava samrøðu við sjúkling og avvarðandi.

## Andlát

Avvarðandi fáa útflýggjað eina vegleiðing í sambandi við andlát á deildini. Ynskja avvarðandi vegleiðing í sambandi við andlát, eru starvsfólkini á deildini fegin til taks.

Vinarliga starvsfólkini á G1

## Virðisgrundarlagið fyri G1

Vit ynskja, at sjúklingurin verður settur í miðdepilin. Tí vilja vit:

- virka fyri, at sjúkuavgerð, røkt og viðgerð tekur støði í tørvinum hjá tí einstaka sjúklinginum, bæði likamliga, sálarliga, andaliga og samfelagsliga,
- virða sjálvsavgerðarrættin hjá sjúklinginum við atliti at heilsustøðu hansara,
- veita skilabestu pínuviðgerð,
- virka fyri, at trygdin hjá sjúklinginum verður sett í hásæti,
- við hollari kunning og góðum samskifti geva sjúklingi og avvarðandi ein virknan leiklut í viðkomandi røkt og viðgerð
- varðveita eitt høgt reinførisstøði,
- virka fyri, at sjúklingurin fær ein virðiligan deyða, har hædd samstundis verður tikin fyri tørvinum hjá avvarðandi.

Landssjúkrahúsið

tel 304500, www.ls.fo